Sosialurin

# VARPIÐ

TV TELEVARPIÐ



Dr1 • Hósdag 1. kl. 19.00

## »Livvagterne« - 1:20

Í síðstu viku av 2008 er tað serliga fleiri filmar, sum eru á skránni á ymisku rásunum. Nýggjársdag byrja tó tvær forvitnisligar røðir. Tann eina verður endursend á Tv3, hin væl kenda krimi-røðin úr 80unum »Miami Vice«. Hin røðin verður frumsýnd á Dr1: Í fyrsta parti av »Livvagterne« er uttanríkismálaráðharrin Henrik Skelbæk komin til Baghdad at halda nýggjár, sjálvandi við sínum lívverjum.

KRINGVARP

SvF • Fríggjadag 26. kl. 20.00

## »Klaksvíksstríðið« - 2:2

Nú 55 ár eru liðin, síðani læknastríðið var í Klaksvík, eru at kalla øll farin, sum høvdu høvuðsleiklutirnar í hesi orrustini, men tað eru framvegis klaksvíkingar, sum kunnu greiða frá hesum báðum árunum. Seinni partur av dokumentarsending, sum Bergljót D. Hentze og Ólavur Rasmussen hava lagt til rættis.



Dr1 • Leygardag 27. kl. 18.05

## »Madagascar«

Leyvan Alex, sebran Marty, giraffurin Melman og áarrossi Gloria liva trygt og væl í djóragarðinum í New York. Men so ein dagin setur Marty sær fyri at fara út! Vinir hansara fylgja tí forvitna, men verða so fangaðir og sendir á eina hendingaríka ferð. Teknifilmur frá 2005 við danskari talu.

**Fríggjadagur 26. desember 2008**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**